gult cyan magenta svart

DAGSINS MEINING

Læra av mistøkum

Loksins kom frágrei›ingin hjá grein 19 nevndini um áttatiárini. Naka› er hon vi›gjørd, men enn er hon ikki tugd og tannla› í fjølmi›lunum, hóast nógv áhugavert er at finna í hesi frágrei›ing. Hvat ver›ur gjørt burtur úr henni í politiskum høpi, er ikki greitt, tí Løgtingi›, veit ikki, hvussu ta› nú skal bera seg at! Skal Løgtingi› umrø›a hana, og ella skulu mistøk ella misbrot fáa avlei›ingar, um misbrot eru framd?

Tey flestu eru samd um, at nógv var gali›, og at føroyska samfelagi› fór logandi á húsagang í áttatiárunum. Men neyvan eru øll samd um, at øll høvdu eitt yvirforbrúk, sum ofta ver›ur sagt. Ta› vóru hóast alt rættiliga nógvir løntakarar, sum ikki høvdu naka› yvirforbrúk, men bara høvdu sína løn at liva av, og hvørki tóku lán ella teir lønarkonto-kredittir, sum peningastovnarnir bjó›a›u.

Fyri fyrstu fer› ver›a atfinningar eisini settar ímóti peningasovnunum av álvara, og ta› fegnast óiva› mong um. Vit minnast, at vit høvdu ein bankastjóra, sum fer› eftir seg›i, at peningastovnarnir høvdu ikki skyldina. Teir vóru ein spegilsmynd av samfelagnum. Spurningurin er, um ta› ikki var júst øvugt í rættiliga stóran mun.

Tá Fossbankin lat upp, kom ein ávís kapping í lag, sum neyvan bara var gó›, tí knappliga lat alt seg gera. Harafturat fór fyrst tann eini bankin og sí›ani hin bankin at bjó›a teimum, sum høvdu lønarkonto ein kreditt. Hesin kundi fyrst vera ájavnt vi› lønina og sí›ani kundi hann ver›a tvær mána›arlønir í stødd. Harafturat komu so nógvu og gó›u lánstilbo›ini, sum bankarnir kundu lata, tí teir fingu so nógvan innistandandi pening frá øllum kredittfelagslánunum, sum donsk kredittfeløg lótu føroyingum.

Gott var eisini at taka lán, tí vit høvdu eina sjúkliga rentuskatting, sum gjørdi ta› møguligt at spekulera í stóran mun, hóast bankalei›slurnar nokta›u fyri, at rentuspekulatión fór fram. Og tær fingu vi›hald frá teimum sokalla›u liberalu flokkunum, Fólkaflokkinum og Sambandsflokkinum! Ikki fyrr enn møguleikin at draga alla rentu frá í inntøku var› tikin av, fingu vit ste›ga rentuspekulatiónini.

Men tann stóru parturin í frágrei›ingini er sjálvandi um mannagongdir og vi›ger›ir í samband vi› tey mongu skipamálini og a›rar ve›haldsbindingar, sum kosta›u føroyska samfelagnum so nógv, tá alt rapa›i. Í hesum vi›fangi› sta›festir grein 19-nevndin, at fyrisitingin var ov illa manna› og ikki nóg gó›. Hetta er ikki naka› n‡tt, og ta› vistu øll, sum høvdu fingurin á pulsinum. Og hesum kann Løgtingi› ikki renna undan, tí Løgtingi› er játtandi myndugleikin, og long tí› gekk, á›renn játtandi myndugleikin ásanna›i hetta, og vit fingu bygt upp eina veruliga mi›fyrisiting, hóast hon ikki var› gjørd eftir fyritreytum, sum vóru hóskilugar til føroysk vi›urskifti.

Sjálvandi hava vit nógv at læra, men vit eiga ikki at venda eyguni frá verandi gongd, sum í nógvum førum minnir okkum áttatiárini - bæ›i innan fíggingar- og tryggingarvinnuna - vi›víkjandi forbrúki og íløgum. Lati› okkum endaliga vi›gera frágrei›ingina, men lati› okkum ikki fara at rópa krossfest, krossfest, tí ta› spyrst ongatí› naka› gottt burturúr. Ta› hevur søgan víst okkum.

NØVN Í VIKUNI

Diamantbrúdleyp

Í dag hava hjúnini Mia og Andrew Godtfred diamantbrúdleyp. Fyrru helvtina av hesum 60 árunum í hjúnalagi bú›u tey í Vági. Men fyri sløkum 30 árum sí›ani keyptu tey hús í J. Paturssonargøtu og fluttu til Havnar.

Mia og Andrew giftust í eini daprari tí›. Í november 1940 gekk seinni heimsbardagi á ø›rum ári, og føroyingar mistu fólk og skip. Andrew var skipsføraralærdur og førdi Silver Spray, sum pápi hansara, Dias á Heyggi, átti. Silver Spray fiska›i vi› snurruvodd undir Íslandi og sigldi til Bretlands øll krígsárini. Hóast manga vandafer› millum londini komu skip og manning tó aftur í øllum gó›um.

Sum vágbningar eru Mia og Andrew bæ›i børn av tí frambur›i, sum gjørdi, at Vágs bygd taldist millum tær fremstu innan føroyska fiskivinnu. Nógv fólk flutti til Vágs tá í tí›ini, og teirra millum vóru foreldrini hjá teimum bá›um. Kristian og Johan Andreas Godtfred fluttu av Heyggi í Porkeri, nøkur ár á›renn Andrew var› føddur, og Mia flutti úr Søldarfir›i til vágs sum smágenta vi› foreldrunum, Ingu og Gunnari Danielsen, tí hann førdi skip á Gør›unum.

Nøkur ár eftir kríggi› var Andrew forma›ur á hvalastø›ini í Lopra og seinni umbo›sma›ur hjá oljufelagnum Shell í Vági. Ta› hev›i vi› sær, at tey komu í samband vi› nogv fólk. Norsk sog skotsk skip komu til Vágs at bunkra. Skipini fingu olju, manningin var› sett til bor›s hjá Miu. Burtur úr hesum kom vinskapur, sum heldur dagin í dag. Bæ›i sunnanfjør›s og nor›anfjør›s eru mong komin á gátt, og hava siti› væl inni hjá teimum.

At koyra oljubil eftir smølu vegunum í sunnaru helvt av Su›uroynni í fimmti- og sekstiárunum kundi vera hættisligt, serliga at fara um Hestin í kavaroki Men ikki vildi Andrew, at nakar skuldi sita kaldur. Nei, so heldur at bi›ja mann koma vi› sær, sum kundi hjálpa honum at grava, um bilurin stó› fastur á veg til Sumbiar. Slíkir túrar kundu gerast drúgvir.

Tá i› tey vóru flutt til Havnar, fór Andrew til skips aftur. Hann fiska›i vi› nótaskipuhum hjá Eileri Jacobsen og var st‡rima›ur vi› Kubabátunum hjá Skipafelagnum á vaktarhaldi vi› oljuboripallarnar í Nor›sjónum. Seinni avloysti hann sum tollari um summari› og var náttarvakt á Tórshavnar Skipasmi›ju. Mia fór eisini út at arbei›a: fyrst í køkin á Hotel Hafnia og sí›ani á Frímerkjadeildina.

Mia og Andrew fingu f‡ra børn. Andrew, sum bú›i í Havn, doy›i í fjør, Gunnvør b‡r í Næstved og tvíbur›arnir Bergur og bogi búgva bá›ir í Havn.



Ólá Christian 70

8. november fyllir ein kendur vinnulívsma›ur í Runavík 70 ár. Ta› er Óla Christian Danielsen, sum seinastu 52 árini hevur fingist vi› lastbilar í Eysturoynni. Neyvan er naka› mansbarn í Eysturoynni, sum ikki kennist vi› navni› Óla Christian. Hann er upp á fornavn vi› tey flestu og hansara bilar síggjast kring alla oynna.

Men vinir og kenningar skulu ikki gle›a seg til naka› ball, nú Óla Christian rundar 70. Tá vit ringdu til hann mánadagin leg›i hann okkum sta›iliga vi› at siga lesarunum, hann var burturstaddur fø›ingardagin. Óla Christian er eitt so livandi menniskja og virkin ma›ur, at honum dámar einki at ver›a mintur á, at árini so javnt nartla burtur av æviskei›num

"Ætlar tú tær slett ikki at pensionerast?" spurdi undirrita›i. " Ta› havi eg slett ikki tí› til!" seg›i Óli, kvikliga.

Hann veit alt um bilar, hann hevur ikki tal á hvussu nógvar bilar hann hevur átt sí›an hann fór undir virksemi í 1948. Og hann fylgir vi› tí›ini. B‡rá›slimur hevur hann veri› í Runavík í samfull 10 ár og meginpartin av hesum skei›i var hann forma›ur í havnarnevndini.

Eitt ey›kenni fyri Óla er, at hann er gó›ur at heita á. Sosialurin ynskir Óla tillukku vi› degnum, hvar enn á klótuni hann er staddur 8. desember í ár.

Treytir fyri valgreinar

Nú tí›in styttist til b‡- og bygdarrá›svali› 21. november, eru vit her á bla›num vi› at ganga undir í valgreinum. Hóast vit seinastu dagarnar hava prenta› fleiri sí›ur vi› valtilfari, liggja framvegis hópin av greinum eftir.

Øll valevni eru kortini vælkomin at senda okkum tilfar, men vit kunnu kortini ikki lova, at tilfari› kemur í bla›i›, tá valevni ynskja ta›.

Fyri at bøta um henda trupulleika hevur bla›lei›slan gjørt av, at valtilfari› ikki skal fylla meira enn eina A4 sí›u - ella umlei› 2.500 tekn.

Saman vi› valgreinum kann prentast andlitsmynd av valevninum. Annar grafikkur ver›ur ikki tikin vi›.

Roknast kann ikki vi› at fáa valtilfar í leygardagsbla›i›.

Sosialurin

Sosialurin
Stovna›ur: 1927
Ábyrgdarbla›stjóri:
Jan Müller jan@sosialurin.fo
Bla›stjóri:
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
Tí›indalei›ari:
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo

Markna›ardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Dagbjørt S. Hansen dagbjort@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

Bla›fólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Ey›un Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turi› Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Sveinur Tróndarson sveinur@sosialurin.fo
Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Myndamenn:
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo

Útgevari/uppseting:
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmi›stø›in

Avgrei›sla:
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Bla›i› ver›ur prenta› mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

L‡singar

Freistir:	Tekstl‡singar	Størri l‡singar	L‡singartorgi›	Heilsanir
T‡sdagsbla›i›	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsbla›i›	T‡s. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsbla›i›	Mik. kl. 10	T‡s. kl. 15	T‡s. kl. 12	T‡s. kl. 12
Fríggjadagsbla›i›	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsbla›i›	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri l‡singar, sum nógv arbei›i stendst av, mugu vera inni í gó›ari tí› og á›renn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbi›jast í gó›ari tí›.

Stødd:
Ein heil sí›a í Sosialinum er 254mm brei› og 346mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmi› millum teigarnar er 4mm.

petur & petur • 320870